














# Handilin á Stíggi

HANDIL OG HANDVERK
*Rúna Sivertsen*

Á Høgabóli í Saltangará liggur vardi verkstaðurin, Stíggjur. Har verður bundið, tøvt og seymað. Smíðja, mála og klipt.

Alt, sum gjørt verður kann fáast til keyps í hugnaliga handlinum á Stíggi. Handilin hevur opið allar yrkadagar. Henda greinin er skrivað soleiðis, at tey menningartarnaðu eisini kunnu lesa hana.

Í handlinum á Stíggi er mangt og hvat at fáa. Um tú ætlar at keypa onkrum eina gávu, far so inn á gólvið har. Har er nógv at fáa. Og tað er slett ikki dýrt. Tey, ið starvast har eru fitt í hondunum. Tey seyma, mála og smíðja.

Fyri stuttum fingu tey bindimaskinu, so nú liggur væl fyri at binda. Tey tøva eisini og seyma húgvur og turrikløð. Alt er minst líka snøgt og tað, sum kann keypast í bindibúðunum.

Tú kanst eisini keypa vøkur turrikløð úr silki, sum tey sjálvi hava málað.

Eisini gera tey grýtulappar, dúkar og upphang. Umframt hillar, gera tey eisini leypar, breyðbakkar og reinsdjór úr træi.

Har er so nógv at fáa, at ógjørligt verður at nevna alt her. Men far ein túr inn í handilin, so sleppur tú eisini at heilsa uppá øll tey fittu fólkini, ið har starvast.



# Arbeiði hjá fiskifrøðingum og ICES

**Hvat byggja fiskifrøðingar og ICES sína ráðgeving á? Hvussu verða stovnsmetingar gjørdar? Hvussu telja fiskifrøðingar fiskin í sjónum?**

RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*

Í einum snøggum og upplýsandi bóklingi, sum Norðurlendska Ráðharraráðið hevur givið út, verður í stuttum greitt frá kvotutilmælum, og hvussu komið verður fram til hesi. Greitt verður eisini í stuttum frá arbeiðnum hjá fiskifrøðingum og ICES.

Í bóklinginum verður sagt, at sjógvurin, sum er gróðrarríkur og gávumildur, er akur fiski-og útróðrarmanna. Tilfeingið í havinum endurnýggjar seg støðugt –

- um vit megna at umsita tað við ábyrgd og við atliti at framtíðini
- um vit forða fyri, at havið verður dálkað og oyðilagt sum føðistova, uppvakstrarøki og beiti hjá fiskastovnunum
- um vit bera so í bandi, at fiskastovnarnir nørast, og nýggir og stórir árgangir koma undan
- um vit ansa eftir, at vit ikki troyta fiskastovnarnar harðari, enn teir tola
- um umsitingin av havinum og havsins ríkidømi verður grundað á kunnleika og burðardygga fiskiveiði.

Havgranskarar og Altjóða Havgranskingarráðið (ICES) veita vinnu og myndugleikum vitan, sum kann vera grundarlagið undir framskygdum fiskiskapi við ábyrgd.

Men hvat byggja fiskifrøðingar og ICES sína ráðgeving á? Hvussu verða stovnsmetingar gjørdar? Hvussu telja fiskifrøðingar fiskin í sjónum?

Hetta eru alt spurningar, sum bóklingurin viðgerð, men sum vit ikki skulu koma nærri inn á í hesum greinastubbanum.

### Hvat er ICES?

ICES er ein vísindaligur felagsskapur fyri havrannsóknir í Norðurhøvum og har um leiðir. Felagsskapurin fæst ikki sjálvur við gransking, men er staðið, har vísindafólk hittast, og granskingarúrslit verða savnað. Granskarar fáa skrivstovuhjálp og nýta dátugrunnar og teldur hjá ICES. Burturúr hesum arbeiði koma tilmæli um kvotur og ráðgeving um, hvussu havumhvørvið eigur at umsitast.

– Tilfarið, sum londini hvør í sínum lagi hava útvegað, verður samanborið, eftirmett og viðgjørt í arbeiðsbólkum, og frágreiðingar frá hesum verða latnar ráðgevandi nevndunum í ICES.

Í bóklinginum verður sagt, at ACFM (Advisory Committee on Fisheries Management) ger tilmæli um flestu fiskasløg, meðan ACME (Advisory Committee on Marine Environment) veitir ráðgeving um umsiting av havumhvørvinum.

ICES tekur ikki lut í samráðingum og er ikki millumgongumaður í ósemjum millum limalondini um kvotuásetingar. Felagsskapurin veitir bert ráð um heildarveiði og ráð viðvíkjandi umsiting av havumhvørvinum.

– Tað eru politisku myndugleikarnir í limalondunum, sum avgera, um teir taka ráðgevingina til eftirtektar ella ikki. Tað er eisini upp til politikararnar, um teir áseta hámarksveiði og samráðast við onnur lond um býtið av felagsstovnum.

### Ikki politiskur

Í bóklinginum verður víst á, at ICES er ikki ein politiskur felagsskapur, men ein vísindastovnur, sum viðger spurningar um tilfeingi og havumhvørvið á vísindaligum grundarlagi.

– Hetta er treytin fyri, at ICES skal verða roknað og virt, sum ein óheftur og ópartískur vísindafelagsskapur.

Bóklingurin ger greitt, at myndugleikarnir í limalondunum skulu ongantíð vera í iva um, at tær útgreiningar, sum ICES veitir teimum um støðuna hjá fiskastovnunum og havumhvørvinum, eru grundaðar á annað enn vísindaliga vitan og útrokningar.

– Tilmælini hjá ICES skulu vera eitt uttanveltað og eftirfarandi støði undir samráðingum og avgerðum í samband við umsiting av ríkidømi havsins og umhvørvi tess.

Limalondini í ICES eru: Belgia, Bretland, Danmark, Estland, Finnland, Frakland, Háland, Írland, Ísland, Kanada, Lettland, Noreg, Portugál, Póland, Rusland, Spania, Svøríki, Týskland og USA.

Tey lond, sum hava eygleiðarastøðu í ICES, eru: Avstralia, Suðurafrika, Grikkaland og Altjóða Náttúruverndargrunnurin, WWF.


*ICES er ikki ein politiskur felagsskapur, men ein vísindastovnur, sum viðger spurningar um tilfeingi og havumhvørvið á vísindaligum grundarlagi.*
*Ein partur av tilfarinum, sum ICES savnar, kemur úr Føroyum*

## Boygdur hjelmur og skermur

FERÐSLUÓHAPP
*Vilmund Jacobsen*

Beint eftir døgurða ein dagin herfyri hendi eitt ferðsluóhapp beint við Posthúsið í Saltangará.

Persónbilurin, sum sæst á myndini, koyrir inn í vinstra afturpart á jeep'inum, sum eisini sæst á myndini.

Jeepurin fekk bert eitt »prus« aftan, men persónbilurin fórst nokso illa í høgru síðu framman.
Maður við myndatóli var á staðnum tók hesa myndina.

### Tríggir bilar

Løgreglan í Runavík sigur, at óhappið hendi, tá ið fremsti bilurin av fýra, sum komu koyrandi inneftir vegnum í Saltangará, snaraði til vinstru og skuldi inn á økið við Posthúsið.

Aftasti bilurin (myndin) rennur inn í jeepin, sum aftur verður skumpaður fram í bilin, ið koyrir frammanfyri.

Sum skilst, slapp bara tann bilurin snikkaleysur, sum snaraði inn á
økið við Posthúsið.

Løgreglan sigur, at eingin fólkaskaði hendi av óhappinum.



# Tjóðveldisflokkurin ella omanlop

VÁRDAGAR
*Vilmund Jacobsen*

Henda myndin møtti okkum, tá ið vit ein av góðu várdøgunum herfyri koyrdu gjøgnum bygdina í Kirkjubø. Myndatólið var við hondina, so vit tóku hesa sjáldsomu myndina, sum neyvan er at finna í lærubókunum um ferðslu!

»Tjóðveldisflokkurin« og tjøldrini ovast – og so niðanfyri »40-340 m«.

Hvat skeltið ímyndar í verandi líki – ella ætlast at ímynda, tá ið klistrimerkið við Tjóðveldisflokkinum er burtur, er upp til hugflogið. Um tað er Tjóðveldisflokkurin, sum er at finna millum 40 og 340 metrar longur frammi – ella um skeltið upprunaliga ávarðar um omanlop (!), vita vit ikki við vissu.

Hvussu leingi, skeltið hevur sæð soleiðis út, vita vit heldur ikki, men tað hevði neyvan sloppið at staðið leingi, um tað ikki júst stóð í Kirkjubø…

Tjóðveldisflokkurin ella omanlop. Ein skemtilig mynd, sum kortini ikki hoyrir heima á almennum vegi.

*Tað er upp til hugflogið, hvat hetta skeltið veg vegkantin í Kirkjubø ímyndar – ella ætlast at ímynda.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

